Eysturkommuna

# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 03.04.2018 kl. 20:00 |
| **Málnr.:** | |
| Nevndarlimir:: | Jóhan Christiansen<br>Hanna Jensen<br>Brandur Jacobsen<br>Árni Jacobsen<br>Hjalti Dalheim<br>Tollakur Joensen<br>Hans Mourits Foldbo<br>Gudny Langgaard<br>Uni Rasmussen |
| Vara limir: | |
| Ikki møtt: | |
| Nevndarskrivari: | Erik Lervig |


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Mál til viðgerðar** | | | |
| 20/18 | 15/00417-15 | Tilmæli til - Umsókn frá Ognarhaganum um øki til seyðahús, matr. 145 | 3 |
| 21/18 | 17/00280-4 | Tilmæli til mál nr. 17/00280 - Summartilboð frá Frítíðarheiminum í Eysturkommunu | 4 |
| 22/18 | 18/00007-5 | Tilmæli til mál nr. 18/00007 - Frábýti frá festi í Syðrugøtu - umbøn um ummæli matr. nr. 104 | 6 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | matr. nr. 108<br>matr. nr. 106<br>matr. nr. 104a<br>matr. nr. 164<br>matr. nr. 107 | |
| 23/18 | 18/00103-2 | Roknskapur 2017 | 8 |
| 24/18 | 18/00117-4 | Veganavn á havnalagnum í Leirvík | 9 |
| 25/18 | 18/00131-3 | Tilmæli til mál 18/00131 - Eykajáttan mars 2018 | 10 |
| | | | |

## 20/18 Tilmæli til - Umsókn frá Ognarhaganum um øki til seyðahús, matr. 145

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevd | 16.03.2018 | 12/18 | 15/00417-15 |
| 2 Býráðið | 03.04.2018 | 20/18 | 15/00417-15 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Málið var fyri á býráðsfundi 25 januar 2016, tá bleiv samtykt at viðmæla loyvi til sundurbýti í ognarhaganum í Leirvík (matr. nr. 145).<br><br>Tá var talan um stykkir, sum vóru áleið 400 m2 hvørt. Ognarhagin biður nú um nýtt viðmæli, har somu stykkir eru vaksin til áleið 1750 m2 hvørt. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar fíggjarligar avleiðingar. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at geva loyvi til sundurbýti í ognarhaganum. |

**Viðtøka Byggi - og býarskipanarnevd 16. marts 2018**
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá umsitingini.

**Viðtøka Býráðið 03. april 2018**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

## 21/18 Tilmæli til mál nr. 17/00280 - Summartilboð frá Frítíðarheiminum í Eysturkommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 15.01.2018 | 1/18 | 17/00280-4 |
| 2 Fíggjarnevnd | 26.03.2018 | 26/18 | 17/00280-4 |
| 3 Býráðið | 03.04.2018 | 21/18 | 17/00280-4 |

**Málslýsing:**

Frítíðarheimið er ansingartilboð fyri børn, sum ganga í Skúlaspíranum, 1. flokki og 2. flokki í Eysturkommunu skúla. Tilboðið er galdandi seinnapartar á degi ella tá skúladagurin er liðugur um 11.30 tíðina.
Verandi skipan er soleiðis, at tá summarfrítíðin hjá skúlanum byrjar í viku 26, steðgar tilboðið fyri tey, sum ganga í 1. og 2. flokki, meðan tilboðið framhaldandi er galdandi Skúlaspíran, tó nú allan dagin, fram til Brúsi, Gjái og Frítíðarheimið fara í summarfrítíð í viku 28 og fýra vikur fram.
Kommunan hevur fingið áheitan frá borgarum, sum vísa á, at tað hevði verði skilagott at víðka um tilboðið soleiðis, at børnini, sum ganga í 1. og 2. flokki eisini kundi verði á Frítíðarheiminum í viku 26 og 27 saman við Skúlaspíranum.
Ein grundgeving fyri, at tað er skilagott at lata tilboðið verða galdandi allar tríggjar nevndu árgangir er, at hetta vildi ført til, at fleiri møta upp og soleiðis breiðkar um grundarlagið at hava opið.
Hugsast kann, at um tilboðið verður víðka, kann hetta koma at lætta um hjá foreldrum, sum ikki hava frí hesar dagar.
Ein onnur grundgeving fyri at lata tilboðið verða galdandi allar tríggjar nevndu árgangir er, at kommunan líka stillar allar árgangirnar, sum í dag eru knýttir at Frítíðarheiminum.

21. mars 2018 – uppískoyti:
Eftir at Trivnaðarnevndin á fundi 15. januar 2018 kom við sínum tilmæli, eru nýggir upplýsingar komnir fram, sum gera fortreytirnar annarleiðis í mun til tilmælið.

Skúlaspírin er eitt kommunalt tilboð og er kostnaður fyri tilboðið galdandi allan dagin. Tvs. ½ dag í skúlanum og ½ dag í Frítíðarheiminum. Hetta hevur sostatt við sær, av vit ikki kunnu áleggja teimum eykagjald fyri ansing tær vikurnar skúlin er farin í summarferiu og fram til dagstovnarnir og Frítíðarheimið fara í summarferiu.
Hetta forðar tó ikki, at latið verður upp fyri, at børnini, sum ganga í 1. og 2. flokki kunnu fáa í boðið ansing í nevnda tíðarskeiðið. Stovnurin er opin hetta tíðarskeiðið, spurningur er bara um víðkast um tilboðið!
Hetta kann gerast eftir sama leisti sum summaransingin er skipað. Tvs. við tilmelding og móti gjaldið.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Eftir verandi skipan eru starvsfólk á Frítíðarheiminum sett í mun til barnatalið á Skúlaspírnaum og eru hesi starvsfólk sostatt til arbeiðis í vikunum fram til dagstovnarnir og Frítíðarheimið fer/a í summarferiu. Um vit lata upp fyri, at tilboðið eisini er galdandi 1. og 2. flokk kann hetta viðføra meiri lønarútreiðslur.

**Tilmæli**

Umsitingin mælir til, at møguligt verður foreldrum at børnum í 1. og 2. flokki at fáa barn teirra ansað í viku 26 og 27. Hetta verður gjørt eftir sama leisti, sum blívur brúktur til tilboð um "summaransing". T.v.s. at foreldur skulu skriva teirra barn upp um tey ynskja ansing í viku 26 og 27.

---

21. mars 2018:
Mæla til at skipanin fyri Skúlaspírabørnini verður skipa ein og undanfarin ár, meðan latið verður upp fyri at børn í 1. og 2. flokki fáa í boðið ansing saman við Skúlaspíranum, tó eftir skipanin sum er galdandi fyri summaransingina.

**Viðtøka Trivnaðarnevndin 15. januar 2018**
Mæla til at tilboðið á Frítíðarheiminum í viku 26 og 27 verður skipað eins og "summaransingin" fyri allar tríggjar árgangirnar (Skúlaspírin, 1. og 2. flokkur).

**Viðtøka Fíggjarnevnd 26. marts 2018**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini dagf. 21. mars 2018.

**Viðtøka Býráðið 03. april 2018**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

## 22/18 Tilmæli til mál nr. 18/00007 - Frábýti frá festi í Syðrugøtu - umbøn um ummæli
## matr. nr. 104
## matr. nr. 108
## matr. nr. 106
## matr. nr. 104a
## matr. nr. 164
## matr. nr. 107

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevd | 19.01.2018 | 3/18 | 18/00007-5 |
| 2 Býráðið | 03.04.2018 | 22/18 | 18/00007-5 |
| 3 Byggi - og býarskipanarnevd | 16.03.2018 | 11/18 | 18/00007-5 |

**Málslýsing:**

Eysturkommuna hevur móttikið skriv frá Búnaðarstovuni viðv. umsókn um frábýti av festi í Syðrugøtu, talan er um matr. nr. 104, matr. nr. 108, matr. nr. 106, matr. nr. 104a, matr. nr. 164, matr. nr. 107.

Festarin hevur sent eina umsókn til Búnaðarstovuna, um at sleppa keypa omanfyrinevndu matr. nr. úr festinum.

Fornminnissavnið hevur verið á staðnum og eisini funnið tilfar um ognirnar.

Fornminnissavnið hevur í skrivi víst á:

- At økið við bóndahúsini, sambært byggisamtyktini liggja í fríøki
- Bóndahús og hoyggjhús eru varðveitingarverd
- Neystagrundin kann koma undir ásetingarnar í fornminnalógini um jarðføst fornminni

Fornminnissavnið leggur eisini dent á, at kommunan átti at ogna sær økið, sum er avsett til fríøkið. Hetta serliga fyri at tryggja at økið verður varðveitt, sum fríøki.

Niðurstøðan í skrivinum er, at ætlaða frábýti kann fremjast við ávísum avmarkingum og servituttum. Millum annað at einki óviðkomandi virksemi verður framt fríøkinum, og at bygningarnir eru varðveitingarverdir og ikki kunnu takast niður ella broytast uttan loyvi, og at um bygningarnir seinni vera friðaðir, kann eigarin ikki krevja, at landið yvirtekur ognina.

Eysturkommuna er biðin at ummæla hetta.

**Ískoyti 16-03-2018.**
Málið var til viðgerð í Byggi- og býarskipanarnevndini 19. Januar 2018.

Síðani er málið blivið kannað nærri, har umsitingin millum annað hevur haft fund við Búnaðarstovuna, Fornminnissavnið og umsøkjara.

Hetta var fyri at fáa neyðugar upplýsingar, og kunna koma víðari í málinum.

| |
|---|
| |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar fíggjarligar avleiðingar |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin viðmælir at ganga umsóknina hjá festara um frábýti av festi í Syðrugøtu, matr. nr. 104, matr. nr. 108, matr. nr. 106, matr. nr. 104a, matr. nr. 164, matr. nr. 107 á møti.<br><br><br>**Ískoytt tilmæli 16-03-2018.**<br>Umsitingin viðmælir at ganga umsókn hjá festara, um frábýti av omanfyri nevndu matr. á møti.<br><br>Í hesum samband hevur kommunan ynski at fáa gøtuna, sum gongur niðanfyri Húsgarð, frámatrikulerað til Eysturkommunu. |

**Viðtøka Byggi - og býarskipanarnevd 19. januar 2018**
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá umsitingini.

**Viðtøka Byggi - og býarskipanarnevd 16. marts 2018**
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til fylgja tilmælinum hjá umsitingini.

**Viðtøka Býráðið 03. april 2018**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini tann 16. mars. 2018

## 23/18 Roknskapur 2017

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 26.03.2018 | 27/18 | 18/00103-2 |
| 2 Býráðið | 03.04.2018 | 23/18 | 18/00103-2 |

**Málslýsing:**

Víst verður til fyriliggjandi roknskap.

**Høvuðstøl:**

| | |
|---|---|
| **Inntøkur íalt** | **119.287.000,00 kr.** |
| | |
| **Útreiðslur** | |
| Rakstrarútreiðslur | 75.110.000,00 kr. |
| Íbúðarmál (útr.til rentustuðul) | 1.315.000,00 kr. |
| Rentuútreiðslur | 1.157.000,00 kr. |
| **Útr.Íalt** | **77.582.000,00 kr.** |
| | |
| **Yvirskot** | **41.705.000,00 kr.** |
| | |
| **Íløgur íalt** | **35.954.000,00 kr.** |
| | |
| **Úrslit eftir løgur og rakstur (RLÚ)** | **5.751.000,00 kr.** |

Í 2017 var goldið 5,1 mió. kr. í avdráttum. Eysturkommuna hevði við árslok 2017 onga nettoskuld, men eina nettoogn á 14,2 mió. kr.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli**

**Viðtøka Fíggjarnevnd 26. marts 2018**
Fíggjarnevndin mælir til at góðkenna fyriliggjandi roknskap

**Viðtøka Býráðið 03. april 2018**
Einmælt samtykt at góðkenna fyriliggjandi roknskap fyri 2017

## 24/18 Veganavn á havnalagnum í Leirvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðið | 03.04.2018 | 24/18 | 18/00117-4 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Víst verður til tilmæli hjá navnanevndini, har mælt verður til at nýggja veganavnið verður "Bryggjan" |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| |

**Viðtøka Býráðið 03. april 2018**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá navnanevndini.

## 25/18 Tilmæli til mál 18/00131 - Eykajáttan mars 2018

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 26.03.2018 | 25/18 | 18/00131-3 |
| 2 Býráðið | 03.04.2018 | 25/18 | 18/00131-3 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Víst verður til hjál. yvirlit yvir játtanir frá 2017 at flyta til 2018.<br><br>Talan er um játtanir sum eru samtyktar í 2017, og har arbeiðið er byrja ella umbiðið í 2017, men sum ikki verður liðugt fyrrenn í 2018. Íalt eru tað 3,5 mió. kr. sum skulu flytast frá 2017 til 2018, hetta er bert íløgujáttanir.<br><br>Á seinast býráðsfundi tann 26. februar, bleiv samtykt at veita eykajáttan til at stuðla verkætlanini TROM við 125 t.kr., og á sama fundi bleiv samtykt at veita Skúlaspíranum eykajáttan til lønir. Fyri fíggjarárið 2018 verður hetta 120 t.kr. Hesar báðar eykajáttaninar eru rakstrarjáttanir. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Íløgurnar vaksa við 3,5 mió. kr., men tá hetta eru játtanir sum vóru játtaðar í 2017, og tiknar við tá, men ikki vóru framdar, ávirkar hetta ikki gjaldføri hjá kommununi.<br><br>Eykajáttaninar til skúlaspíran og Trom viðføra at rakstrarútreiðslurnar í 2018 vaksa við íalt 245 t.kr, og tað ávirkar gjaldføri tilsvarandi.<br><br>Samlaða úrslitið (RLÚ) lækkar við 3,75 mió. kr. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at veita eykajáttanir sum víst á omanfyri á íalt 3,75 mió. kr. Gjaldføri hjá kommununi er gott og mælt verður til at peningurin verður tikin av innistandandi. |

**Viðtøka Fíggjarnevnd 26. marts 2018**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Viðtøka Býráðið 03. april 2018**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

fundurin lokin 22.00

Jóhan Christiansen

Hanna Jensen

Brandur Jacobsen

Árni Jacobsen

Hjalti Dalheim

Tollakur Joensen

Hans Mourits Foldbo

Gudny Langgaard

Uni Rasmussen